# Mercedes-Benz við nýggjum A-klassa



*Mercedes-Benz koma á marknaðin við nýggjum A-klassa, sum nú er ein størri bilur enn forgangarin*



*Í nýggju útgávuni er tað fyrstu ferð A-klassin eisini fæst við 3 hurðum*



*Mercedes-Benz A við 5 hurðum*



*Mercedes-Benz innan. Kvaliteturin í kabinuni er nú tann sami sum í størru Mercedes bilunum*

**Tá Mercedes-Benz A fyrstu ferð kom á marknaðin í 1997, sum tann fyrst lítli Mercedes, fekk hann eina alt annað enn góða byrjan. Men tey seinnu árini hevur sølan verið góð, og í september kemur ein heilt nýggjur A-klassi á marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mercedes-Benz koma á marknaðin við nýggjum A-klassa, sum nú er ein størri bilur enn forgangarin og fæst nú við bæði 3 og 5 hurðum. Bilurin er 23 cm longri og 4,5 cm breiðari við 14,5 longri aksilfrástøðu.

Eins og forgangarin hevur hesin dupultan botn, soleiðis at við ein frontalan samanstoyt, verður motorurin trýstur inn undir bilin. Hetta gevur eina trygd sum í størri bilum. Ein annar fyrimunur er at nógv av tí sum annars tekur pláss í kabinuni verður goymt undir dúrkinum.

Við heilt nýggjum hjóluupphangum og elektromekaniskari servostýring er talan um ein bil við sera góðum koyrieginleikum.

Úgávurnar við bensinmotorum eru hesar: A 150 við 1,5 litur og 95 hk, A 170 við 1,7 litur og 116 hk, A 200 við 2,0 litur og 136 hk. Í 2005 kemur ein A 200 turbo við 193 hk. CDI dieselútgávurnar eru hesar: A 160, A 180 og A 200, sum allir hava 2,0 litur motor við ávikavist 82, 109, og 140 hk.

Bilurin kemur á marknaðin í september, og donsku prísirnir byrja við 323.000.

## Mercedes-Benz A 150

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,5 ltur bensin 95 hk |
| 0-100 km/t | 1,2 sek |
| Bensinnýtsla | 16,1 km/l |
| Dekkstødd | 185/65-15 |
| **Stødd og vekt** | |
| Longd | 384,0 cm |
| Breidd | 176,0 cm |
| Hædd | 159,0 cm |
| Eginvekt | 1.195 kg |
| Viðførisrúm | 430 litrar |

## Saab 9-7X



Fyrst í komandi ári kemur ein nýggjur Saab 9-7X á amerikanska marknaðin. Bilurin, ið verður bygdur yvir ein GM-plattform, verður framleiddur í USA og kemur seinni á evropeiska marknaðin

*Kelda: Motor Magasinet*

## Toyota / Mitsubishi starvsfólk



Tá Mitsubishi verksmiðjan í Okazaki í Japan letur aftur síðst í 2005, verða 400 av starvsfólkunum sett í starv hjá Toyota. Verksmiðjan er tætt við Toyota City

*Kelda: Motor Magasinet*

## Skoda Fabia facelift



Í september kemur ein nakað broyttur Skoda Fabia á marknaðin. Størstu broytingarnar eru t.d. nýggir kúfangarar og tokulyktir. Innan eru eisini fleiri designbroytingar og møguleiki fyri at velja inntrekk í fleiri litum

*www.semler.dk*

ítróttur

Nr. 161 • hósdagur • 26. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Formaðurin í HSF:

# Ítrótturin verður miðsavnaður

**– Vit mugu virðismeta tað íkast, sum útlendsk ítróttarfólk geva ítróttarlívinum og nærumhvørvinum úti um landið og ikki bara fokusera uppá, at tey stjala arbeiði frá føroyingum, vísir formaðurin í HSF, Eivind Jacobsen, á**

ÚTLENDSK ÍTRÓTTARFÓLK
*Stefan í Skorini*



*Daniel Rapa hjá VÍF er ein teirra, sum hevur lyft støðið í føroysku hondbóltskappingini. Tað er hetta íkastið til ítróttarlívið og nærumhvørvið, sum vit skulu taka við í metingarnar, tá talan er um útlendsk ítróttarfólk, heldur Eivind Jacobsen, formaður í HSF*

*Savnsmynd*

Stórur vandi er fyri, at allur ítróttur framyvir verður miðsavnaður í Havn, um ikki ítróttarfeløgini fáa lagaligari treytir frá landsins myndugleikum í sambandi við løn til útlendsk ítróttarfólk. Tað heldur formaðurin í Hondbóltssambandi Føroya, Eivind Jacobsen.

Nevndin í hondbóltssambandinum var týsdagin á fundi við løgmann um støðuna hjá útlendskum ítróttarfólkum. Nevndin sigur í tíðindaskrivi, at tað hon hevur fingið eitt slag av lyfti um, at endurnýggjan av arbeiðsloyvum hjá hesum fólkum verður viðgjørt eftir somu treytum, sum vórðu praktiseraðar fyri jól.

Hetta fegnast formaður hondbóltssambandsins sjálvandi um, men hann fýlist á framferðina hjá tí politiska myndugleikanum á hesum økinum.

– Tað eru ov nógv fólk, ið hava sovið í tímanum í hesum málinum. Vit vistu longu fyri hálvum ári síðani, at henda støðan fór at taka seg upp og hava roynt at gjørt vart við trupulleikan, men eingin hevur latið við seg koma, sigur Eivind Jacobsen, formaður í HSF, og tá sipar hann bæði til politikarar og til hondbóltsfeløgini, sum ikki hava gjørt nóg væl vart við seg í hesum máli.

– Málið er farið ígjøgnum uttan at fólk hava givið sær far um fylgjurnar av tí framferð, sum Innlendismálaráðið nú praktiserar. Politikarar og feløgini hava ikki mótmælt nóg harðliga, og vit kundu væl sloppið undan tí roki, sum nú er íkomið, heldur hann.



*Formaðurin í HSF hevur verið á fundi við løgmann og fingið eitt slag av lyfti um, at tey arbeiðsloyvi, sum longu eru latin útlendingum, verða endurnýggjað eftir somu treytum. Óvist er hvussu leingi landsstýrið fer at halda fast við tann leistin*

*Savnsmynd*

### Miðsavning

Hóast Hondbóltssambandið hevur fingið eitt lyfti um, at endurnýggjan av arbeiðsloyvum nú skal vera eftir teimum somu treytunum, sum tá loyvini vórðu givin, so er HSF langt frá nøgt við verandi støðu.

Ætlanin er, at eitt ítróttarfelag skal binda seg at lata einum íðkara í minsta lagi 52 % av einum arbeiðsmannaløn, og síðani kann íðkarin í mesta lagi arbeiða fyri 48 % av eini arbeiðsmannaløn við síðuna av ítróttinum.

Hetta fer at hava sera stórar avleiðingar fyri ítróttarvirksemi, serliga úti á bygd, har vinnulívið ofta stuðlar ítróttarfeløgum við at geva útlendskum ítróttarfólki arbeiði á staðnum. Hetta fer ikki at bera til í framtíðini, tí at íðkarin bert kann hava eitt hálvtíðarstarv við síðuna av ítróttinum.

– Vit halda, at tað er órímiligt at krevja, at ítróttarfeløgini skulu rinda ein so stóran part av inntøkuni hjá einum leikara. Veruleikin er tann, at nógv útlendsk ítróttarfólk ongar pengar fáa frá feløgunum fyri at spæla, men bert eitt arbeiði á staðnum, vísir formaðurin á.

Eivind Jacobsen ber stóran ótta fyri, at henda regla fer at hava við sær, at nærum alt ítróttarvirksemi á hægri støði verður savnað í miðstaðarøkinum. Havnarfeløgini eru nógv sterkari fíggjarliga enn feløgini á bygd, sum ikki fara at hava nakran møguleika at bjóða teimum av. Endin er, at allir teir dugnaligastu bygdamenninir enda í havnafeløgum, sum vit eisini síggja innan fótbóltin.

– Vit kunnu taka Vág sum eitt gott dømi. Høllin í Vági er full eini 10-15 ferðir um árið, tí at fólk á staðnum vilja síggja kvinnuliðið hjá VB. Treytin fyri hesum er, at teir útlendingar, sum mangan eru tær berandi kreftirnar á liðnum, fáa eitt arbeiði á staðnum. Vit mugu hyggja eftir tí íkasti, sum útlendsk ítróttarfólk geva ítróttarlívinum og nærumhvørvinum úti um landið og ikki bara fokusera uppá, at tey stjala arbeiði frá føroyingum, vísir Eivind Jacobsen á.

### Lagaligari treytir

Um ítróttarfeløgini ikki fáa lagaligari treytir enn tað, sum er í uppskoti beint nú, er vandi fyri, at ítróttarfeløgini úti á bygd ikki kunnu fylgja við longur.

Landsstýrið hevur boðað frá, at tað fer at seta ein arbeiðsbólk, sum skal orða nakrar greiðar reglur fyri arbeiðsloyvi til útlendingar í Føroyum. Miðað verður eftir at hava eitt uppskot klárt at seta í verk tann 1. januar.

Enn er ógreitt hvussu hesar reglur fara at síggja út, men um innlendismálaráðið ikki broytir støðu kann væntast, at tær nýggju reglurnar verða tær somu, sum hava verið praktiseraðar seinastu mánaðirnar.

Formaðurin í Hondbóltssambandinum vónar, at ítrótturin fær lagaligari treytir at ganga undir, so at ítróttarvirksemið kann halda fram og mennast, sum tað hevur gjørt seinastu árini – við góðari hjálp frá dugnaligum útlendskum ítróttarfólki.

## Tíðindaskriv frá Hondbóltsambandinum

Nevndin í HSF hevur í dag verið í Tinganesi á fundi við løgmann um útlendingamálið.

Á fundinum fekk HSF upplýst at teir útlendingar, sum í dag hava arbeiðsloyvið, fáa arbeiðsloyvið endurnýggja eftir somu treytum, sum verandi arbeiðsloyvið eru givin. HSF fegnast um tann skáan sum nú er givin teimum leikarum, ið nú eru í landnum.

Eisini bleiv upplýst, at nýggir leikarar, ið koma til landið, koma eftir teimum treytum, ið landsstýri hevur avtala við Udlendingestyrelsen. Tað hevur við sær, at ítróttarfeløg eru noydd at gjalda uml. kr 9.000,00 til møguligar nýggjar leikarar um mánaðin í løn.

HSF metur at gjaldið fyri útlendskir leikarar er ov nógv, og at feløgini ikki megna at gjalda hendan kostnaðin. HSF fer tí at royna at ávirka tað politisku skipanina til at broyta hesar treytir.

**Tórshavn t. 24/08-04,**
**Hondbóltsamband**
**Føroya**